Jóannes Eidesgaard: Hetta er skelkandi

–Finnbogi Arge eigur at skifta nevndina fyri P/F Vágatunnulin út í stundini

ÁKI BERTHOLDSEN

–Hetta er skelkandi og arbeiðið at gera tunnilin undir Vestmannasundi kundi ikki fingið eina verri byrjan, enn tað nú fekk.

Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins sigur, at tað, sum er farið fram seinastu dagarnar, eigur at fáa avleiðingar.

Tað, hann sipar til, er avgerðin hjá nevndini í P/F Vágatunlinum at taka upp samráðingar við J&K Petersen um at gera vegirnar í sambandi við Vágatunnilin, hóast Byggitek hevði tað lægsta tilboðið.

– Hevði hetta verið í nøkrum øðrum landi rundanum um okkum, hevði hetta fingið grundarlagið undir Finnboga Arge at ridla.

– Í øllum førum eigur hetta at fáa landsstýrismannin at at skifta nevndina fyri P/F Vágatunlinum út í stundini, tí framferð hennara í hesum máli hevur týðiliga víst, at tað ber ikki til at hava álit á henni, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann sigur, at tað er beinleiðis óhugnaligt, at nevndin fyri Vágatunlinum soleiðis í eini handavending brýtur gamlan lisitatiónssið og tekur næstlægsta tilboð framum lægsta tilboð.

– Nevndin fyri P/F Vágatunnilin dumpaði á síni fyrstu próvtøku og eigur at fara frá, sigur Jóannes Eidesgaard

–Ein grundgeving hjá nevndini er, at byggifelagið hjá J&K Petersen er fíggjarliga sterkari enn Byggitek.

– Sostatt hevur nevndin fyri Vágatunlinum mett um fíggjarligu førleikarnar hjá báðum feløgunum. Men tað hevur nevndin fyri Vágatunlinum vónandi kannað, áðrenn hon bjóðaði Byggitek upp í lisitatiónina. Tað ber ikki til at seta spurnartekin við fíggjarliga førleikan hjá Byggitek nú.

– At nevndin ger tað kortini, er ein ábending um, at hon ikki hevur kannað málið nóg væl frammaundan.

Og Jóannes Eidesgaard heldur, at tað er ein uppaftur álvarsligari støða, tí so hevur nevndin ikki gjørt sítt arbeiðið nóg væl.

–Um so er, at nevndin ikki hevur megnað at gera sítt arbeiðið til lítar í sambandi við vegagerðina, hvussu kunnu vit so hava álit á, at hon megnar at umsita eitt so stórt arbeiðið, sum tað er at gera sjálvan tunnilin.

Ein onnur grundgeving er, at Byggitek hevði ætlanir um at samstarva við E. Pihl & Søn, og nevndin sigur, at hetta samsvarar ikki við politiska ynski um, at tað skal føroysk arbeiðsmegi brúkast til arbeiðið.

–Hesa grundgevingina skilji eg heldur ikki, tí ætlanin var at samstarva við E. Pihl & Søn í Føroyum, og tað er eitt sjálvstøðugt, føroyskt felag, sum betalir skatt í Føroyum.

Skúgvaður til viks

Hann sigur eisini, at hetta málið hevur víst, at semjan í løgtinginum um framferðarháttin í sambandi við Vágatunnilin, bleiv brotin longu í føðslinum.

– Fyri hálvum øðrum ári síðani gjørdi Finnbogi Arge sær stóran ómak at taka grundarlagið undan Landsverkfrøðnginum. Og í sambandi við Vágatunnilin var heldur ikki ætlanin at Landsverkfrøðingurin skuldi fáa nakran leiklut.

– Men eftir togarí aftur og fram í løgtinginum, endaði tað við eini semju, sum flest øll kundu liva við, nevniliga, at Landsverkfrøðingurin skuldi upp í part. M.a. skuldi hann hava eftirlitið við arbeiðnum og gera tilmæli um, hvør skuldi gera tað.

–Landsverkfrøðingurin mælti til at taka av lægsta tilboðnum hjá Byggitek.

Men at nevndin fyri Vágatunnilin kortini tekur næstlægsta tilboð hjá J&K Petersen framum, er ein endalig staðfesting av, at Landsverkfrøðingurin fullkomiliga skal avmonterast sum tekniskur ráðgevari í sambandi við samferðsluútbyggingina í Føroyum.

Hann minnir eisini á, at vit standa á gáttuni til eina nýggja oljuvinnu. Í oljuvinnuni eru listitatiónir dagligur kostur. Og tað er kanska tað mest álvarsama av øllum, heldur Jóannes Eidesgaard.

–Tað er eitt ótrúliga óheppið signal at senda vinnuni í londunum rundanum okkum, at hvat hesum økinum viðvíkur, eru Føroyar enn at rokna sum ein „bananlýðveldi", tí her er vanliga byggilógfrøðin ikki er galdandi og her eru ikki skipað viðurskifti.

– Hetta kann gera, at vælskipað feløg, sum kanska kundu hugsað sær at virka í Føroyum, setast aftur, tí hvør tímir at brúka tíð og pening uppá at gera seg galdandi í einum landi, har tað bara er uppá kvamsvís, at tey verða boðin upp í part.

Nakað at hugsa um

Formaður javnaðarfloksins sigur, at hetta er ein niðurgerðing av Landsverkfrøðinginum, sum átti at givið øllum teimum tinglimum, sum ivaðust í framferðini í sambandi við Vágatunnilin, nakað at hugsa um.

Men hann heldur, at hetta er ein støða, sum samgongan hevur skapt. Og skal málið takast upp politiskt, má tað eisini vera samgongan sum ger tað.

– Andstøðan er ov fáment til at gera nakað einsamøll.

– Men skuldi onkur í samgonguni funnið uppá at tikið málið upp, er lítið at ivast í, at stórur partur av andstøðuni eisini er til reiðar at hjálpa til, fyri at gera ein enda á hesum óskilinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Blokadan ímóti Vágatunlinum stendur við

–Tað einasta, vit vilja tryggja okkum er, at alt er farið rætt fram, sigur formaðurin í Føroya Handverksmeistarafelag

ÁKI BERTHOLDSEN

–Blokadan hjá Føroya Handverksmeistarafelag ímóti Vágatunlinum stendur við.

Og vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Handverksmeistarafelag, sigur, at fyribils er støðan óbroytt.

Hann sigur, at tað einsta, sum Føroya Handverksmeistarafelag vil tryggja sær, er at tað er rætt farið fram í hesum máli.

– Og tað hava vit enn ikki fingu vissu fyri.

Hann sigur, at fyri eini viku síðani bað Meistarafelagið um fund við P/F Vágatunlinum, men enn hevur felagið ikki svarað aftur.

Vit mugu ganga út frá, at Byggifeløgini, sum eru boðin at bjóða, eru góðkend frammanundan, sigur formaður í Føroya Handverksmeistarafelag

Tí hevur P/F Vágatunnilin nú fingið rykkjara.

Á tí fundinum vil Føroya Handverksmeistarafelag hava at vita, hvussu Vágatunnilin er komin til ta niðurstøðu, at tað, samanumtikið, er til størsta frama fyri byggiharran at J&K Petersen fær arbeiðið at gera vegirnar í sambandi við undirsjóvaruttunilin, hóast tað byggifelagið ikki hevur lægsta tilboðið á pappírinum.

Sí annars frágreiðing frá P/F Vágatunlinum aðrastaðni í blaðnum.

– Vit vilja bara tryggja okkum, at spælireglarnar eru hildnar, so er tann søgan úti, hvat okkum viðvíkur, sigur Vilhelm M. Johannesen.

– Og støðan er tann, at limir okkara fáa boð, tá ið teir aftur kunnu taka samráðingar upp við P/F Vágatunnilin.

Hann leggur afturat, at tey boðini koma ikki, fyrrenn fundurin hevur verið við leiðsluna í P/F Vágatunnilin.

Tá ið arbeiði verða boðin út í innbodnari lisitatión, verða so ikki feløgini, sum verða boðin uppí lisitatiónina, góðkend frammanundan?

– Tað má ein ganga út frá.

– Alt annað er eitt sindur undarligt og kann skjótt koma undir arging.

Eitt nú hevur P/F Vágatunlinum heft seg við, at Byggitek er í veikara lagi fíggjarliga.

Plaga byggiharrar at kanna slík viðurskifti, áðrenn feløg verða boðin uppí eina innbodna lisitatión?

–Eg havi ongantíð hoyrt um, at tað ikki verður kannað áðrenn, sigur Vilhelm M. Johannesen.

Vit hava valt besta tilboðið

ÁKI BERTHOLDSEN

Stjórin í P/F Vágatunlinum stendur fast við, at tilboðið frá J/K Petersen var tað besta fyri byggiharran út frá eini heildarmeting.

Sí grein aðrastaðni í blaðnum um, hvussu stjórin í Vágatunlinum kemur til ta niðurstøðuna.

Men hann vísir m.a. á, at í krónum og oyrum er munurin á teimum báðum lægstu tilboðunum ikki so týðiligur, at ikki onnur viðurskifti eiga at verða tikin við.

Eitt nú vísir hann á, at J&K Petersen hevur givið eitt fast tilboð, men Byggitek tilskilar sær rætt til at taka eyka, um arbeiðið verður meiri umfatandi, enn mett var.

Og verður fyrivarni harafturat tikið fyri møguligum eykakostnaði av at byggiharrin broytir projektini, verður J&K enntá 300.000 bíligari.

Ein atfinning ímóti Vágatunlinum er, at nú er nakað seint at fara at ivast í fíggjarliga førleikanum hjá Byggitek at gera arbeiðið.

Dávid Reinert Hansen sigur, at Vágatunnilin gjørdi ikki metingar av byggifeløgunum, áðrenn tey vórðu boðin upp í lisitatiónina ogtí eru feløgini sum so ikki góðkent frammanundan.

Landsverkfrøðingurin mælti til, hvørji føroysk feløg, vit skuldu bjóða upp í lisitatiónina, og tí tilmælinum fylgdu vit.

– Tá ið tilboðini vóru komin inn, vóru tvey tilboð, sum vóru burturúr bílig. Tey bæði byggifeløgini tóku vit so burturúr og bóðu um neyvari upplýsingar um tey, eitt nú um roknskaparviðurskifti. Niðurstøðan av teimum kanningunum er ein orsøk til, at Vágatunnilin hevur valt J&K Petersen framum Byggitek.

Í sambandi við sjálvan tunnilin er øðrvísi.

– Har vóru 12 feløg biðin um upplýsingar og av teimum eru nøkur sáldað frá og onnur eru boðin við at bjóða upp á arbeiðið, sigur Dívid Reinert Hansen.

Ryggbrot á rættartrygdina

Kallar Høgni Hoydal landst‡risma›ur ta›, um landst‡ri› kom vi› einum vi›mæli til Udlændingestyrelsen, uttan heimild í nakrari lóg


Høgni Hoydal, landst‡risma›ur í lógarmálum, sigur at landst‡ri› hevur onga heimild at geva Udlændingestyrelsen, vi›mæli, solei›is at te 19 serbisku flóttafólkini kunnu sleppa til Føroya

FRÓ›I LØKSÁGAR›

Í tí›indasending hjá danska Tv2, t‡skvøldi›, var søgan um tey 19 serbisku flóttafólkini, sum hava søkt um uppihaldsloyvi í Føroyum, og í løtuni ólógliga uppihalda seg í Danmark, vi›gjørd.

Í tí›indasendinini var› sagt, at landst‡ri› ikki vildi geva ta› ney›uga loyvi›, og tí var ney›ugt at senda flóttarfólkini heimaftur, til Eysturslavonia har tey eru óynskt, og óvist er, hvør lagna bí›ar teimum, eftir at kroatar hava tiki› valdi› í landinum.

Sambært donskum fjølmi›lum er ta› Føroya Landst‡ri, ella Høgni Hoydal, landst‡risma›ur í lógarmálum, sum eru atvoldin til at Udlændingestyrelsen ikki kann loyva serbisku flóttarfólkunum at flyta til Føroya, sjálvt um hesi bæ›i hava fingi› lyfti um arbei›i og bústa›.

Udlændingestyrelesen krevur eitt loyvi, ella greitt vi›mæli úr Føroyum, á›renn teir vilja loyva flóttafólkunum til Føroya.

Høgni Hoydal var› í donskum sjónvarpi endurgivin fyri at siga, at hann ikki vildi geva serbisku familjunum uppihalds og arbei›sloyvi í Føroyum fyrr enn flóttafólkamál er føroyskt málsøki.

-Sum løggávan er í løtuni, kann hvørki landst‡ri›, ella nakar einstakur landst‡risma›ur, koma vi› einum loyvi ella tilmæli til Udlændingestyrelsen. Vit hava onga føroyska útlendingalóg, hetta er eitt danskt málsøki. Udlændingestyrelsen skal taka allar endaligar avger›ir. Vit eru bara at rokna sum eitt kommunu kontór í hesum máli

Høgni Hoydal sigur ví›ari, at grei›ar reglur eru fyri mannagongdini í slíkum málum. Tá Udlændingestyrelsen skal geva fólki uppihalds og arbei›sloyvi í Føroyum, ver›ur máli› sent til Føroya til ummælis. Hetta fer fram á embætismannastigi, og tá grei›a er fingin á, um tær treytir, i› danska lógin setur, til arbei›i og bústa› og onnur vi›urskifti, eru uppfylgdar, ver›ur máli› sent aftur til Udlændingestyrelsen til endaliga stø›utakan.

Ta› er tí óskiljandi Høgna Hoydal óskiljandi, at Udlændingestyrelsen nú aftur hevur sent máli› til Føroyar, tá ta› er li›ugt avgreitt her heima, og Udlændingestyrelsen hevur fingi› ta› aftur, uttan nakra vi›merking, til endaliga stø›utakan.

- Hetta er eitt rættiliga principielt mál fyri okkum. Vit hava onga heimild at geva eitt tílíkt loyvi ella vi›mæli. Høvdu vit eina føroyska útlendingalóg so var ø›rvísi.

- Grei›ar reglur á økinum høvdu havt vi› sær, at landst‡risma›urin vi› ábyrgd av hesum málsøki, eisini hev›i ábyrgd av tiknum avger›um, sigur Høgni Hoydal. Men sum nú er, er hetta ikki føroyskt málsøki, og tí er heldur eingin landst‡risma›ur, sum kann taka nakra avger›.

- Skulu vit í landst‡rinum nú til at taka avger›ir í slíkum málum, vildi ta› veri› beinlei›is ryggbrot á rættartrygdina, tí uttan nakra útlendingalóg, kundi ta› blivi› persónlig vi›urskifti, sum vóru avger›andi fyri hvør kundi fingi› arbei›s og uppihalds loyvi, og ikki, sigur Høgni Hoydal at enda.

Ni›urstø›an hjá Høgna Hoydal er tískil at so leingi vit ikki hava okkara egnu útlendingalóg, fer landst‡ri› ikki at leggja seg útí mál av hesum slag. Donsk løggáva er galdandi, og tískil ver›ur ta› upp til Udlændingestyrelsen at taka avger› í hesum máli. Føroysk embætisfólk skulu bara síggja til, at treytirnar danska lógin setur, ver›a fylgdar, og lúka umsøkjararnir hesar treytir ver›ur ikki meiri gjørt vi› máli› frá føroyskari sí›u

Henda stø›an hjá landst‡rinum hevur vi› sær at, tey 19 serbisku flóttafólkini eftir øllum at døma ver›a send heimaftur, um ikki okkurt n‡tt hendir í málinum. Komandi dagarnir fara at vísa hvat ví›ari hendir. Hendir einki, hava flóttafólkini ein mána›a at gera seg kláran til heimfer›ina.

Føroya Myndakalendari komin


Føroya Myndakalendari 2001 er nú at fáa til keyps í sølubúðunum. Eins og undanfarin ár er hann prýddur við sera vøkrum litmyndum

EIRIKUR LINDENSKOV

Føroya Myndakalendari 2001 er nú útkomin. Hetta er 21. árið, at Frøoya Myndakalendari gevur út kalendaran, og aftur hesaferð mugu vit ásanna, at talan er um ein prýðiligan kalendara.

Litfagrar landslagsmyndir fangaðar av myndamanni við einum ótrúliga góðum eyga fyri slíkum. Forsíðumyndin sýnir Fuglafjørð - sæð úr tyrlu ein sólskinsdag.

Myndakalendarin er av sonnum ein fragd fyri eyga. Fleiri av myndunum eru vakrar loftsmyndir, ið úr erva - eisini úr fjøllunum, sýna okkum, hvussu vøkur føroyska náttúran er, bæði í summar- og vetrarbúna, eitt nú vetrarmyndin úr Sumba ella summarmyndin av vøkru bygningunum í Tinganesi í Havn. Ella myndin úr Múla, at har vit síggja Malinsfjall á Viðoynni í baksýni.

Til føroyingar og ferðandi Myndakalendarin er eitt framúrskarandi amboð hjá ferðavinnuni. Her verða Føroyar vístar úr vakrasta sjónarhorni, og tað er einki at ivast í, at fremmandafólk tekkjast landi okkara, tá tey síggja slíkar vakrar myndir.

Tað er tó ikki bara ferðafólkini, sum fáa gleði av kalendaranum. Nógvir føroyingar uttanlands hava kalendaran hgangandi.

Men myndakalendarin verður eisini brúktur til annað. Á baksíðuni er sum vanligt ein rúgva av praktiskum upplýsingum um Føroyar, og tað skal sigast útgevaranum til rós, a teir brúka dagførdar upplýsingar. Teksturin er skrivaður bæði á enskum og donskum.

Eins og undanfarin ár er Føroya Myndakalendari 2001 prentaður í Íslandi. Prentþjónustan og øOddi í Reykjavík hava staðið fyri prentingini